# Til Anniku Mittún Jacobsen

HELGI ABRAHAMSEN



**Annika Mittún Jacobsen, Kringvarpsstjóri, var skjót at koma við eini viðmerking til mína grein um Kringvarpið. Tað skal hon hava takk fyri**

Sum eg lesi greinina, so er hon í verjustøðu, og hevur fingið ta fatan, at eg leggi Kringvarp Føroya undir at gera alt á dýrasta hátt. Tað var ikki ætlanin frá mínari síðu, og vil eg undirstrika, at eg vil als ikki Kringvarpinum nakað ilt. Eg royni bara at koma við einum góðum hugskoti, nú Kringvarpið er í eini truplari støðu.

Tað sum eg segði (og haldi fast við), er at sjónvarpsparturin, við verandi bygnaði, kostar meira, enn Kringvarpið klárar at forsvara, og tí er brúk fyri nýhugsan. Tað má Annika geva mær rætt í.

Annika ger, tíðliga í greinini, tað sum hon kallar "rættingar til nøkur faktuell ting í míni grein". Hon sigur fyri tað fyrsta, at sendingarnar um Klaksvíksstríðið kostaðu ikki 500.000 krónur, men 35.000 pr. sending í eksternum útreiðslum, umframt fasta løn hjá teimum í Kringvarpinum, sum arbeiddu við sendingunum. Eg skilji bara ikki, hví hon so ikki eisini sigur, hvat hetta gevur tilsamans.

35.000 fyri hvørja sending, tað gevur 70.000 fyri báðar. Og so kemur lønin hjá kringvarpsfólkunum afturat. Talið sum eg nevndi (500.000) havi eg frá keldum í Kringvarpinum, men um so er, at talið er skeivt, so fari eg at heita á Anniku um at upplýsa, hvat rætta talið er, og eisini vil eg biðja hana upplýsa, hvat ein meðal senditími við føroyskum sjónvarpstilfari (framleitt í Kringvarpi Føroya) kostar at framleiða. Tað kundi verið áhugavert at fingið at vita.

**Innanfyri ella uttanfyri**

Næsta sokallaða "rættingin av faktuellum feilum", sum Kringvarpsstjórin ger av míni grein, er, at hon sigur, at Zacharias Hammer og onnur uttanfyri Kringvarpið gera framvegis sendingar fyri Kringvarpið. Tað er frálíkt, men eg dugi bara ikki at síggja, hví hon kallar hetta ein faktuellan feil hjá mær. Eg nevndi bara Zacharias Hammer sum eitt gott dømi um, hvat ein amatørur kann menna seg til, um hann fær loyvi til tað.

Men tá hon nevnir hetta við at fólk uttanífrá koma inn í Kringvarpið at gera sendingar, so ivist eg í, hvør verður roknað fyri at vera uttanfyri, og hvør er innanfyri. Eg meini so við – tá tú sleppur inn í hølini hjá Kringvarpinum, og sleppur at brúka tekniska útgerð hjá Kringvarpinum, og fært teknikarar hjá Kringvarpinum at hjálpa tær, og fært eitt gjald frá Kringvarpinum fyri arbeiðið, sum tú gert, ert tú tá ikki í roynd og veru í starvi hjá Kringvarpinum?

Tað sum eg mæli til, er at fólk uttanfyri, sum av berum áhuga brúka ein part av frítíðini til at gera sjónvarpssendingar, sleppa framat við tí, sum tey gera – og ikki minst, at tey fáa at vita, at tey hava henda møguleikan.

**Fakligur stoltleiki**

Viðvíkjandi tí fakliga stoltleikanum, sum Kringvarpsstjórin nevnir, so vil eg undirstrika, at tá eg mæli til at lova amatørunum framat, so merkir tað ikki, at allir journalistar skulu út. Sjálvandi eru journalistarnir bestir til at gera tíðindasendingar, men tað er ikki vist, at teir eisini eru bestir til at gera náttúrufilmar, videoløg, undirhaldssendingar, ungdómssendingar o. s.fr. Tað er har eg haldi, at onnur eiga at sleppa framat, uttan at tey harvið traðka á fakliga stoltleikan hjá journalistunum.

Annars hoyrdi eg nú ein morgunin í Útvarpinum, at Kringvarpsstjórin situr sjálv og ger eina sjónvarpssending, hóast hon onga útbúgving og ongar royndir hevur á tí økinum, og tað er júst tað, sum eg haldi, at onnur eisini skulu fáa høvi til, hóast atgongdin til tekniska útgerð og teknisk vegleiðing neyvan verður tann sama sum hjá stjóranum.

**Góð ráð – hóast nógv ár ov sein**

Annika endar greinina við at geva mær hesi ráðini: " Far út og tak myndir, klipp, fortel eina søgu í myndum og kom so inn og vís okkum hana, so kunnu vit taka eitt prát um hetta."

Eg takki fyri tilboðið, men má samtíðis siga, at tað verður helst av ongum á hesum sinni. Tað var tann tíð, tá eg javnan gjørdi júst tað, sum Annika nú biður meg gera, uttan at tað bleiv til meira enn "eitt prát um hetta". Nú eri eg farin í annað starv, men míni ráð til Anniku eru framvegis: Lova amatørunum framat! – Ikki til eitt prát, men til at gera sendingar!

# Ísrael og Hamas

MARNER AV LOFTI
Idavej 6
9280 Storvorde



So hendi tað einaferð enn, at stríðið millum Ísrael og Hamas brast á aftur. Hetta kom ikki óvart á tey, sum vita hvussu viðurskiftini hava verið millum Gaza og Ísrael seinastu tíðina.

Hamas-menninir vóru eisini greiðir yvir, at tað bert var ein spurningur um tíð, nær Ísrael fór at gera hernaðarligt stórálop. Atfinningarnar at hernaðarálopi Ísraels komu eisini stutt eftir, bæði í donskum og føroyskum tíðindamiðlum.

Ísrael tók seg úr Gaza í 2005. Hetta var ein partur av "land fyri frið" politikkinum hjá Ariel Sharon, ið tá var forsætisráðharri Ísraels. Hann helt, at tað var rætt at tvingsilsflyta teir 8.000 jødarnarút úr Gaza við teirri avleiðing at jødiskir býir og bygdir í Gaza vórðu avtoftað.

Ariel Sharon og ísraelska stórnin vórðu hálovað av stjórnum kring heimin fyri hetta "land fyri frið" átakið. Grundgevingarnar frá Hamas um at skjóta rakettir inn í Ísrael vóru, at so leingi sum Ísrael hersetti Gaza, hevði Hamas rætt til at skjóta rakettir inn í Ísrael. Frá 2005 vóru hvørki jødar ella ísraelskir hermenn í Gaza – palestinar høvdu fingið krøv síni uppfylt.

Men Hamas helt á við at skjóta rakettir inn í jødiskar býir í suður-Ísrael. Í 2008 vórðu ikki færri enn 3200 rakettir skotnar av úr Gaza og inn í jødiskar býir við einans einum endamáli: At drepa so nógvar jødar, menn, kvinnur og børn, sum gjørligt.

Vit sum liva í so friðarligum londum sum Danmark og Føroyum kunnu mestsum óttaleys bera fram okkara hugsan um hvussu eitt land sum Ísrael eigur at verja sínar íbúgvar. Tað er rættiliga áhugavert, at Danmark hevur tikið lut í krígnum í Irak og nú tekur lut í krígnum í Afganistan, uttan at hvørki Irak ella Afganistan hava lopið á Danmark.

Tað letur til, at vit saktans kunnu leypa á lond, sum eru túsundtals kilometrar burturi, uttan at hesi lond nakrantíð hava verið ein hóttan ímóti okkum, men at tað skal vera øðrvísi við Ísrael.

Vit hálova demokratiinum, tá ið irakar fara á val og vit játta staðfestandi fyri hvørjum øðrum, at tað var gott, at vit vóru við til at taka valdið frá Saddam Hussein. Vit vita ikki við vissu hvussu mong mannalív kríggið í Irak hevur kravt, men talið liggur um eini 70.000.

Kortini loyva vit okkum at finnast at hernaðaratgerð Ísraels í Gaza. Ísrael er einasta demokratiska landið í miðeystri. Hetta er eitt land, ið stendur fyri somu demokratisku virðum, sum vit hálova og við valdi royna at noyða Irak og Afganistan inn í.

Tað er rímiligt, at tað ávirkjar okkum kensluliga, at ósek menniskju lata lív í Gaza.

Men hví finnast vit ikki at Hamas, sum viðhernaðarkvettiðhevur tikið valdið í Gaza? Hví verður ikki funnist at Hamas, sum er á listanum yvir yvirgangafelagskapir bæði hjá ES og USA? Hví finnast vit ikki at Hamas, sum hevur sent 9.400 rakettir inn í ísraelskar býir síðani 2003?

750.000 ísraelsmenn liva í støðugum ótta fyri at verða raktir av rakettum frá Hamas. Tey hava millum 15 og 60 sekund at sleppa sær niður í bumbuskýlini! Tað er ikki torført at ímynda sær, hvussu tað er at liva í ótta 24 tímar hvørt samdøgur ár eftir ár og hvønn menniskjaligan kostað hetta ber í sær.

Danska ríkið, sum vit føroyingar eru ein partur av, sendir hermenn sínar í kríggj uttan at danska ríkið er hótt ella álopið. Eisini ungir føroyingar hava verið og eru sjálvbodnir krígsmenn í Afganistan! Men taðverður funnist at Ísrael tá teir verja sínar egnu borgarar.

# Er bankerne på vej med nationalisering?

JØRN ASTRUP HANSEN



Bankerne er ved at blive kvalt i politisk velvilje. Vi risikerer, at staten overtager bankerne. Med politisk ligemageri vil bankpakken også omfatte de brodne kar og forsinke en tiltrængt selektion.

I oktober fik vi med lov om finansiel stabilitet en såkaldt bankpakke. Pakken, der indeholder en ubetinget statsgaranti for pengeinstitutternes forpligtelser, havde til formål at styrke pengeinstitutternes muligheder for at tiltrække indlån og lån fra andre pengeinstitutter.

Statsgarantien, der efterfølgende er blevet kaldt bankpakke I, har givetvis haft den tilsigtede effekt. Likviditeten flyder igen nogenlunde frit. De private pengeinstitutter har i to år lånt statens kreditværdighed. En større vestjysk bank optog 30. december 2008 et obligationslån på en halv mia. kroner med forfald 30. september 2010 – samme dag, som statsgarantien udløber. Pengeinstitutter, der med en statsgaranti i ryggen ikke kan skaffe sig likviditet, står ikke til at redde.

For ni år siden så pengeinstitutterne med lige dele bæven og spænding årtusindskiftet i møde. Ville computerne overhovedet kunne forholde sig til Y2K – år 2000? Det gik. Men hvordan bankerne i 2010 dog skal komme ind i oktober, kan nok forekomme lidt usikkert. Der er grund til at tro, at natten mellem september og oktober i 2010 vil holde flere bankdirektører vågne end natten mellem 1999 og 2000.

Men pengeindstitutterne andre problemer end likviditeten. En alt for let adgang til likviditet og en alt for lav rente førte i perioden 2004-07 til en uhæmmet udlånsvækst. Resultatet var finansielle bobler i aktiemarkedet og i ejendomsmarkedet. Nu er boblerne bristet, og sektoren står til enorme tab, som sikkert vil vise sig at være ujævnt fordelt. Flere pengeinstitutter står med et meget nærværende kapitalstabsproblem.

Angiveligt er det ikke muligt for pengeinstitutterne at refinansiere den ansvarlige lånekapital, der forfalder over de næste par år. Långiverne har fået kolde fødder, efter at det har vist sig, at den ansvarlige kapital er – ansvarlig. Og bankerne, der med aggressive aktietilbagekøb lidt forhastet har udbetalt den overskydende kapital til aktionærerne, synes nu uden lyst til at indbyde aktionærerne til at tegne ny kapital.

Det hersker i øvrigt nogen uklarhed om det reelle behov for yderligere kapital. Adskillige pengeinstitutter har været ude med meldinger om, at de ikke mangler kapital – men rentable udlånsprojekter. Og nok forfalder der i år og næste år ca. 20 mia. kr. i ansvarlig lånekapital. Men lånene kan sædvanligvis forlænges mod betaling af en merrente på 1½-2 pct. p.a. I dagens marked et luksusproblem.

Men spørgsmålet er vel, om vi overhovedet slipper for en bankpakke II. Hvis regeringen får magt, som den har agt, vil den allerede i denne måned tilbyde at skyde ny kapital ind i veldrevne banker. Det sker angiveligt ikke af hensyn til bankerne. Snarere er det for give bankerne kræfter til at dulme smerten hos de mange vælgere, der har måttet se friværdien og andre windfall gains svinde ind til naturlig størrelse.

Dansk Folkeparti mener ikke, det er en opgave for politikerne at tage stilling til, hvilke banker der er veldrevne, og Socialdemokraterne mener vist nok, at den nye bwankpakke, som partiet med en eufemisme kalder en samfundspakke, skal være obligatorisk. Pengeinstitutterne skal – som med bankpakke I – have et tilbud, de ikke kan sige nej til.

Politikerne skal passe på, at de i deres iver ikke kommer for skade at sætte alle markedsmekanismer ud af spil. Hvordan sikrer vi, at der sker en naturlig selektion? Det var dog ikke blot Roskilde Bank, der havde fået roskildesyge.